## DAGSINS MEINING

# Ungdóminum tørvar konserthøll

Ì kjalarvørrinum á nógvu umrøðuni av konserttiltaki á Kambsdali í vikuskiftinum verður staðfest, at stórur tørvur er á konserthøli í høvuðsstaðnum við nútímans ljós- og ljóðútgerð.

Hóast vit eiga vælegnað høli til konsertir, eitt nú Norðurlandahúsið og Mentanarhúsið í Fuglafirði, so má ásannast, at ungdóminum og tónleikinum tørva eina veruliga konserthøll í høvuðsstaðnum. Tá hugsað verður um ta menning, sum hevur verið og er innan tónleik og tónleikalívið og tann áhuga, sum ungdómurin vísir hesum útviklingi, so er tað undranarvert, at myndugleikarnir í landsins størstu kommunu umboðandi ein stóran part av landsins ungdómi, ikki hava gjørt eitt nútímans konsertstað til part av sínum ungdóms- og tónleikapolitikki. Vit síggja, hvussu ítróttarhallir, samkomuhús o.a. spíra alla staðni. Men vit hava lyndi til at gloyma tann partin av ungdóminum, sum hvørki fer til ítrótt ella á møti.

Havnin er vorðin so mikið stór, at býurin átti at havt eini veruligt ungdóms- og mentanarhús, sum eisini kundu hýst eini stórari og nútímans konserthøll umframt venjingarhølum. Tá sluppu vit undan at skipa fyri slíkum konsertum í skúlagørðum og í ítróttarhøllum kring landið. Og tá fingu vit skipað viðurskifti. Alt gott at siga um tey mongu tiltøk og støð, sum hýsa ungdómi og tónleiki. Her verður so fyrst og fremst hugsað um Margarinefabriksbygningin, har tónleikaglaði ungdómurin roynir at húsast sum frægast.

Spurningurin er bara, hvussu leingi vit kunnu halda fram við at bjóða bæði teimum ungu og teimum góðu fólkum, sum taka sær av teimum ungu tónleikarunum, halda teimum til og eru við til at menna teirra tónleikaevni, slíkar umstøður.

Tað skal vera okkara inniliga áheitan á myndugleikarnar í høvuðsstaðnum um at taka upp spurningin um eitt ungdóms- og mentanarhús, ið eisini kann hýsa hølum hjá ungdóminum at venja tónleik í og eini konserthøll, í størsta álvara.

Tey ungu, áhugafeløg, tónleikalærarar og onnur royna at gera vart við hesi viðurskifti, men tað er líkasum at politikararnir ikki geva hesum nóg nógv gætur. Latið okkum tí í felag taka eitt tak fyri at fáa ungdóminum í høvuðsstaðnum og teimum mongu, sum skjótt og lætt kunnu koma til Havnar, nú vegakervið er so nógv útbygt, eitt fysiskt umhvørvi, har tey kunnu koma saman til gaman og álvara - við tónleikinum sum bæði íblástrarkeldu og drívmegi.

Latið okkum tí eisini fáa nakað konstruktivt burtur úr tí óhepnu støðu, sum tey ungu komu í, tá tey leitaðu sær til jólakonsert á Kambsdali.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sandoyingar og Suðuroyingar, nú nærkast Suðurleiðin

**Mads A Hansen**
*240 Skopun*

Nú blívur tað alt meira og meira veruligt, at vit fáa undursjóvartunnulin til Sandoynna, og harvið møguleikarnir við at økja títtleikan av Sandi til Suðuroynna við Smyrli. Uppskotið hjá Arnfinni Kallsberg er kærkomið. Um uppskotið vinnur frama, kemur nevniligani kostnaðurin og harvið kappingarførið hjá Sandoynni og Suðuroynni o. ø. at verða meira rættvíst. Sum er nú, skulu vit sumreisa til meginøkið at arbeiða upp til fleiri tímar dagliga fyri ferðing + at tað ofta er neiðugt við kost og logi omaná, so tað er ógvuliga tungt hjá virkjum, handverkarum o. ø. at kappast, tá arbeiðir verða útboðin á meginøkinum.

Annars verður ógvuliga spennandi at frætta, hvat seismikkurin staðfestur. Um tað eydnast at leggja tunnulin, sum ætlað, verður tunnulin umleið 9 km, og vegagerðin verður minimal.

# Kráka lívgar best um unga sín

**Hjalmar N. Poulsen**



Okkara »fyrimyndarligi« forsprákari innan lógarverkið, fyrrverandi politistur og sýslumaður í farloyvi, breyt ferðslulógina við at renna á ein annan bil aftan á at hava koyrt yvir hávatenn og harvið brotið treytaðu víkiskildu sína, »gloymdi« at boða løgregluni frá óhepna tilburðinum. Hetta er sera mannminkandi, og tað er undir alt lágmark, at hann aftan á hetta skal hava fingið sersømdir, tá eftirfylgjandi rættarsøkn fór fram. Hevði tað verið onkur annar talan var um, hevði slíkt aldri komið fyri. Viðkomandi framferð er sera illoyal fyri almenningin sum heild og mannminkandi fyri fútagreipuna, so tað forslær. Og sigast kann við góðari samvitsku, at slíkt sanniliga luktar av hákorruptión. Men kráka lívgar best um unga sín - og soleiðis verður ofta tikið til.

# Ófriðurin í Sjálvstýrisflokkinum

**Sámal Petur í Grund**
*Landsnevndarformaður sjálvstýrisfloksins*



Fjølmiðlarnir hava hesar seinastu dagarnar ført fram, at tað er ófriður í Sjálvstýrisflokkinum. Og at hesin ófriður stendst av støðutakanini til rættindi teirra samkyntu í samfelagnum.

Tað er rætt, at ófriður hevur verið í flokkinum um hesi viðurskifti undanfarnu árini.

Tí skal eg vegna landsnevnd floksins og samsvarandi landsfundi floksins gera greitt, at vit ikki meta hetta vera eitt mál sum floksstøða skal takast til.

Hvørki landsnevnd ella landsfundur floksins metir, at flokkurin eigur at taka støðu vegna limirnar í hesum viðkvæma máli.

Allir limir og harvið eisini tinglimur floksins, eru í hesum máli frítt stillaðir, eins og tað er í øðrum flokkum á tingi.

Við ynski um eini Gleðilig Jól.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.